# John Arni nær við IM-norm



**Mangan hava okkara fremstu telvarar verið nær við altjóða gjøgnumbrot, men eru tíverri hvørja ferð steðgaðir á málstrikuni**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

John Arni Nilssen varð sera tætt við sín fyrsta IM-norm, tá hann herfyri í Politiken Cup 2001 royndi seg millum leyvurnar.

Hann hevði eina stak góða kapping, telvaði trygt ímóti sterkari mótstøðu og megnaði at vinna alla mótstøðu har hann var ratingfavorittur.

Undan seinasta talvinum hevði John Arni sjey stig av tíggju møguligum. Seinasti banamaður hansara varð sera sterki IM Erling Mortensen, sum vísti seg at verða ein ov stórur biti til føroying okkara.

Vann John Arni hetta talv varð IM-normurin heima, men soleiðis vildi lagnan tað ikki á hesum sinni. John Arni kann tó vera nøgdur við sítt avrik og fer hann longu í bardaga aftur tann 4. august í Bergen, sum einasta føroyska umboðið, tá NM verður telvað.

John Arni endaði loksins sum nummar 19-26 av 160 luttakararum við sínum sjey stigum. Heili fimm stórmeistarar býttu fyrsta pláss; Michail Gurevich, Alexander Rustemov, Peter Heine Nielsen, Lev Psakhis og Nick deFirmian sum allir fingu hálvtníggjunda stig.

*John Arni Nilssen snávaði í seinasta umfari av Politiken Cup og fekk tí ongan IM-norm á hesum sinni*

### Hini eisini væl við

Herluf Hansen, Hans Kristian Simonsen og Miriam Olsen høvdu øll eisini eina góða Politiken Cup kapping.

Serliga vísti Herluf góðar dygdir við flottum úrslitum í fyrru helvt, men dovnaði eitt petti í endaróðrinum og gav hetta hálvtsætta stig, men hinvegin fitt av rating.

Hans Kristian og Miriam fingu bæði fimm stig, sum eisini varð yvir tað væntaða og tískil ein góð kapping hjá øllum føroyingunum í árligu Politiken Cup.

# Spennandi ólavsøkutalv

Tiltikni dysturin millum Havnar Telvingarfelag og Klaksvíkar Talvfelag á Ólavsøku varð dramatiskur.

Liðini bæði vóru sterk, tíggju mans á hvørjum liði, og ringt varð at meta um úrslitið sjálvt, tá seinastu tíðarneyðirnar spøktu.

Klaksvíkingar vísti seg hendan dagin sum tað betra liðið, og endurvunnu teir tí Ólavsøkusteypið frá í fjør við einum teprum 6-4 sigri.

Á vinnandi liðnum vórðu Eyðun Nolsøe, Ólavur Simonsen, Rani Nolsøe, Terji Petersen, Tummas M. Anthoniussen, Petur H. Poulsen, Rúni Dragaberg, Símin P. Anthoniussen, Óli Joensen og Mannbjørn Anthoniussen.

Carl Eli N. Samuelsen, Jóan H. Andreasen, Martin Poulsen, Olaf Berg, Herluf Hansen, Jóhan Gaard, Johan E. Hansen, Poul Poulsen, Hans B. Højgaard og Jóannes Guttesen mannaðu havnarliðið.

# Korchnoi ikki til at steðga

Í Biel í Sveis verður sterk stórmeistarakapping telvað í hesum døgum.

Í styrkisrøð eru Gelfand (2714), Svidler (2695), Lautier (2675), Grischuk (2669), Korchnoi (2617) og Pelletier (2531) telvarnir í hesari kapping.

Tvíumfar verður telvað, og hava teir í skrivandi løtu leikt átta umfør.

Maðurin við sínum 70 árum og næstan eins gamal sum hinir fimm tilsamans, nevnliga livandi legendan, Victor Korchnoi, er sera óvæntað klárt á odda. Hann hevur hálvtsætta stig, meðan Svidler hevur hálvtfimta stig.

Síðani koma Gelfand og Pelletier við hvør sínum fýra stigum, meðan Grischuk og Lautier liggja aftastir við trimum stigum hvør. Tvey umfør resta í.

Sagt varð um Korcnoi, at hann hevði sítt hæddarpunkt í 1978 tá hann nærum koppaði Karpov í HM dysti teirra. Tá varð hann 47 ára gamal og varð tað mett sum gamalt, men hvør skuldi trúð, at hann nú sum 70 ára gamal enn vinnur á heimstjørnum sum Gelfand, Grischuk og Lautier? Ein sonn livandi legenda.

# Todi er aftur á trappuni

**Tá Europa Cup verður liðugt hjá FCK, ætla teir at selja onkrar av bestu spælarunum, og millum teirra verður Todi Jónsson nevndur**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*



Mikukvøldið sóu 14.345 áskoðarar í Parkini í Keypmannahavn FCK vinna 3–1 á georgiska meistaraliðnum Torpedo Kutaisi. Talan var um klassamun. Tað var ikki fyrrenn í yvirtíðini, at tað eydnaðist gestunum at pynta um.

1. hálvleikur var tamur. Í yvirtíðini fekk Zuma hol á, eftir snilt samanspæl við Christian Lønstrup. Í 59. minutti økti Lønstrup, eftir at Heine Fernadez hevði spælt hann leysan við høvdinum, og Fernandez økti til 3–0 í 74. minutti. Hann var púra leysur, tá hann stútaði sending frá innskifta Carsten Fredgaard í kassan.

### Todi er á veg

Stóri spurningurin millum fótbóltshugaðar føroyingar er, um Todi Jónsson verður tøkur, tá FCK komandi mikukvøld fer at spæla í Parkini ímóti italska Lazio.

Todi hevur vant fyrrapartin av vikuni, og tað hevur verið upp á tal, at hann skal vera við, tá FCK í vikuskiftinum fer at spæla á útivølli ímóti FCM. Tað vil við øðrum orðum siga, at nógv bendir á, at Todi verður tøkur komandi mikukvøld.

Um hann sleppur framat beinanvegin er ein annar spurningur. Eftir sigurin mikukvøldið segði Heine Fernandez, at hann gleddi seg til at spæla ímóti Lazio. Tað eru kortini ikki spælararnir, men Kent Karlsson, venjarin, sum var ógvuliga væl nøgdur mikukvøldið, sum fer at gera av, hvørjir skulu spæla ímóti Lazio.

Mikukvøldið fór Zuma út, tá tað restaðu tjúgu minuttir. Tá varð Thomas Thorninger fluttur av miðvallarplássinum í vinstru og fram í álopið.

### Sølulistin

Fyrr í summar hava teir í FCK aftur og aftur sagt, at teir ætla ikki at selja nakrar spælarar. Nú tykist pípan hava fingið eitt sindur øðrvísi ljóð.

Í vikuni segði Niels Christian Holmstrøm við Berlingske Tidende, at teir verða noyddir at selja onkrar spælarar, tá leikluturin hjá FCK í Europa Cup verður liðugur í hesum umfarinum. FCK hevur 31 spælarar, og tað ber ikki til eitt heilt kappingarár. Sjálvandi vóna teir, at FCK fer at vinna ímóti Lazio. Um teir gera tað, so verður eingin spælari seldur fyrrenn bólkaspælið í europeisku meistarakappingini verður liðugt.

Um pengar skulu fáast burturúr, halda teir í FCK, at spælarar, sum hava landsliðsstøði í Danmark skulu seljast. Millum hesar verða nevndir Zuma, Jacob Laursen, Niclas Jensen, Thomas Rytter, Christian Lønstrup, Thomas Thorninger og so Todi Jónsson. Sambært Berlingarin kann roknast við, at teir kunnu fáa 25–30 milliónir fyri Zuma, og at hinir kunnu seljast fyri tíggju milliónir í part.

# hygg & hoyr



**Frá fríggjadegi 3. august til hósdagin 9. august**

**SVF Fríggjakvøldið kl. 20.20**

## Í apubúrinum 1

*– bretsk dokumentarrøð*

Bretsk dokumentarrøð um ein djóragarð fyri apur.
Í Dorset í Suðuronglandi liggur djóragarðurin Monkey World, ið er ein tann sjáldsamasti av sínum slag í Evropa.

Jim Crownin og kona hansara Alison, ið er djórapsykologur, arbeiða eisini fyri at steðja ólógligum handli við apum.
*Hetta er framhald av røðini, sum vit sendu í fjør.*

**SVF Leygarkvøldið kl. 23.25**

## The Rock

*– Undirhaldandi amerikanskur spenningsfilmur frá 1996 við Sean Connery og Nicolas Cage.*

Bretski njósnarin Patrick Mason skal saman við vísindamanninum Stanley Goodspeed og nøkrum servandum hermonnum treingja inn í gamla fongslið á Alcatraz, har ein heryvirmaður hóttir við at senda eina rakett við eiturgassi móti San Francisco. Hetta líkist eini ómøguligari uppgávu, men Mason er tann einasti, sum er sloppin undan við lívnum av tí tiltiknu fongsulsoynni.

*Leikstjórn: Michael Bay*

**SVF Sunnukvøldið kl. 21.05**

## Tíð til kærleika

*– amerikanskur kærleiksfilmur frá 1996*

Tally Atwater (Michelle Pfeiffer) hevur ein dreym um at gerast journalistur í sjónvarpinum, og hon hevur viðrák: Warren Justice (Robert Redford) tíðindastjóri á einari sjónvarpsstøð í Miami, fær eyga á hesa gomlu servitrisuna og gevur henni ein møguleika. Hann er lærari og hon er næmingur. Tally er sera dugnalig og skjótt kann Warren ikki læra hana meira og sambandið teirra millum gerst spent.

*Leikarar: Robert Redford, Michelle Pfeiffer, Stockard Channing o.o.*

*Leikstjórn: Jon Avnet*

**SVF Mánakvøldið kl. 20.20**

## Chrissy

*– avstralsk dokumentarsending*

Chrissy var elst av fýra systrum og hon var øðrvísi. Hon rýmdi heiman sum tannáringur. 17-ára gomul varð hon neyðtikin og byrjaði at gera uppreistur móti monnum. Tá ið hon at enda fortaldi familjuni, at hon var samkynd, vistu tey tað longu, men at hon var HIV positiv, helt hon loyniligt í átta ár. Besti vinur hennara, Jacqui, fylgdi henni seinasta árið av lívi hennara.

**SVF Hóskvøldið kl. 23.10**

## At brenna og at vera útbrendur

*– svensk sending*

Arbeiði og frítíð renna saman í einum nýggjum lívshátti. Innanfyri IT-heimin eru nógvir pengar, tað skal ganga skjótt og arbeiðsfólkini hava langar dagar. Men menniskjansligu avleiðingarnar av einum slíkum arbeiðsdegi eru stórar.

**SVF Hóskvøldið kl. 19.00**

## Ein hurð til fortíðina – um mumiur

*– bretsk dokumentarsending*

Tey eru fremmand frá einari fjarari fortíð – og tey stinga seg upp í okkara heimi – fullkomiliga uttan tíð og stað. Tað snýr seg um menniskju, sum eru mumiur – ella væl varðveidd lík – frá fyrndartíð, og hesar mumiur koma alt oftari undan kavi og betri varðveidd enn nakrantíð fyrr.

## Fríggjadagur 3. august

**SVF**

18.30 Likkulikkuleia 10
19.00 Trý á ferð 8:13
19.25 Hokus Krokus – donsk urtagarðsrøð
20.00 Dagur og Vika
20.20 Í apubúrinum 1 – ensk djórasending
20.45 Gekkur
21.25 Daddy – am. kærleiksfilmur
22.55 Brúgvin við Arnhem – enskur/amerikanskur krígsfilmur Óhósk. fyri smábørn
01.45 Liðugt

**Eurosport.com**

07:30 Golf
08:30 Sailing
09:00 Car Racing
09:30 Motorsports
10:00 Athletics
11:00 Athletics
11:30 Athletics
13:00 Athletics
13:30 Athletics
14:00 Athletics
15:00 Athletics
15:30 Athletics
17:00 Athletics
17:30 Athletics
19:00 Tennis (Live)
20:30 Athletics
21:30 Athletics
22:00 News
22:15 Adventure
23:15 Xtreme Sports
23:45 Athletics
00:15 News
00:30 Close

**BBC Prime**

0.00 TLZ: »Great Writers of the 20th Century«
1.00 TLZ: »The Human Animal«
2.00 TLZ: »Your Place or Mine«
2.30 TLZ: »Following A Score«
2.55 TLZ: »Adagio for Strings«
3.00 TLZ: »The Authentik & Ironicall Historie of Henry V«
3.50 TLZ: »Ever Wondered?«
4.00 TLZ: »Trouble at the Top – Too Many Cooks«
4.40 TLZ: »Landmarks – Timelines«
5.00 TLZ: »French Fix – Getting Around«
5.30 TLZ: »English Zone«
6.00 Superted
6.10 William's Wish Wellingtons
6.15 Playdays
6.35 Run the Risk
7.00 Incredible Games
7.30 Celebrity Ready Steady Cook: »Pam St Clement & Patsy Palmer«
8.00 Style Challenge: »Chinese New Year«
8.25 Change That: »Blackpool«
8.50 Bargain Hunt
9.20 Antiques Roadshow
10.05 Animal Hospital in Oz
10.35 TLZ: »Horizon – The Genius of the Jet«
11.25 Fantasy Rooms: »Art Nouveau«
11.55 Celebrity Ready Steady Cook: »Angela Griffin & Charlie Lawson«
12.25 Style Challenge: »Dior Special«
13.00 Doctors
13.30 Eastenders
14.00 Change That: »Durham«
14.30 Bargain Hunt
15.00 Superted
15.10 William's Wish Wellingtons
15.15 Playdays
15.35 Run the Risk
16.00 Incredible Games
16.30 Top of the Pops 2
17.00 Gardeners' World
17.30 Doctors
18.00 Eastenders
18.30 Escape to the Sun
19.00 To the Manor Born
19.30 Best of British: »Maureen Lipman
20.15 The Tenant of Wildfell Hall
21.10 Coogan's Run: »Natural Born Quizzers«
21.40 Later with Jools Holland
22.40 The Stand up Show
23.10 The Royle Family
23.40 Game on

**BBC World**

0:00 BBC News
0:30 HARDtalk (r)
1:00 BBC News
1:30 Talking Movies (r)
2:00 BBC News
2:30 Europe Direct (r)
3:00 BBC News
3:30 Asia Today (r)
3:45 World Business Report (r)
4:00 BBC News
4:30 HARDtalk (r)
5:00 BBC News
5:30 Click Online (r)
6:00 BBC News
6:30 Europe Direct (r)
7:00 BBC News
7:30 HARDtalk
8:00 BBC News
8:30 Top Gear (r)
9:00 BBC News
9:30 Life (r)
10:00 BBC News
10:30 HARDtalk (r)
11:00 BBC News
11:30 Talking Movies (r)
12:00 BBC News
12:30 Life (r)
13:00 BBC News
13:30 HARDtalk (r)
14:00 BBC News
14:15 World Business Report
14:30 Talking Movies (r)
15:00 BBC News
15:30 Life (r)
16:00 BBC News
16:30 Asia Today
17:00 BBC News
17:15 World Business Report
17:30 Top Gear (r)
18:00 BBC News
18:30 World Business Report
18:45 Sport Today
19:00 BBC News
19:30 HARDtalk (r)
20:00 BBC News
20:30 Future Fantastic
21:00 BBC News
21:30 World Business Report
22:00 BBC News
22:30 Correspondent
23:00 BBC News
23:30 World Business Report (r)
23:45 Asia Today

**3**

05:00 Børne-hjørnet med Disney
07:00 TV-shop
08:00 Herkules - de unge år
08:25 Ricki Lake (G)
09:15 Ricki Lake
10:10 Horton-sagaen(G)
11:00 Horton-sagaen
11:50 Panter-tanter
12:20 Vild med dig
12:50 Melrose Place - classic
13:45 Interne affærer
14:40 Pæn pige - sej sild
15:10 Min kære familie
15:40 Baywatch Hawaii
16:35 Ricki Lake
17:30 Med på moden
18:00 Susan - sød og single
18:30 Bette
19:00 Sjov og Spas
19:30 Sjov og Spas
20:00 Faktor 21 Film: Klavertimen
22:00 Sex & the City
22:30 Hvad med et togrøveri
00:35 Lægerne
01:35 The Raiders
02:55 Sunset Beach
03:40 Sunset Beach (G)
04:25 Godnat

**ÚF**

07.00 Tíðindi
07.05 Morgunlestur Poul Sørensen úr Havn lesur
07.35 Morguntónleikur
07.35 Góðan morgun Føroyar Bjørg Brend og Kári Olsen leggja til rættis
08.00 Tíðindi
08.05 Góðan morgun Føroyar
09.00 Tíðindi
09.03 Ein summardagur í Runsivali (e) Stuttsøga eftir Hanus Kamban. Margreta Næss lesur
09.28 Dagsins tónar
09.50 Morgunlestur (e) Poul Sørensen úr Havn lesur
10.00 Tiðindi
10.05 Fimleikaløtan - vika 3
10.10 Máltráðurin Elis Poulsen leggur til rættis.
11.00 Tíðindi
11.03 Á sanganna veingjum (e) Gunnvør Poulsen leggur til rættis
11.30 Undir døgurða
12.00 Veðurtíðindi
12.03 Middagstónleikur
12.15 Skráin og lýsingar
12.20 Tíðindini
12.40 Døgurðatónar
13.00 Tónatímin
14.00 Í Víngarðinum (e)
15.00 Tíðindi
15.03 Rót og Rútma Petur Rouch velur tónleikin
16.00 Tíðindi
16.03 Zenith
17.00 Tíðindi
17.05 Vikuskiftið
18.00 Fríggjakvøldstónar Øssur Egholm velur løgini
18.25 Skráin og lýsingar
18.30 Tíðindini
18.50 Tónleikur
19.00 Stórir røðarar Kári Sólstein og Fróði Løkságarð skipa fyri
20.00 Estudio 2000 Kári Annand Berg leggur til rættis.
21.00 Fimleikaløtan - vika 3 (e)
21.05 Dagsetur Øssur Egholm leggur til rættis
22.00 Tíðindi

**Rás 2**

09:45 Orðið Bíbliulestur v/ Anju Hansen
10:00 Go'morin Skráin, veðrið, aktuelt, dagsins mál, prát við lurtarar og tónleikur. Ó.J.Rólantsson er vertur. Telefonin svarar á 359993.
12:00 Lýsingar & Kunngerðir
12:10 Lættur tónleikur
13:00 Ynskiløtan Heilsur frá lurtarunum Laila Jacobsen er vertur. Send heilsur via heimasíðuna ella á fax. 359990.
15:00 Rák Dagsins rák. Aktuelt kjak og tónleikur. Gunnar Hansen og Georg Eystan Á eru vertir. Ring 359993.
17:00 Lættur tónleikur
18:00 Lýsingar & Aktuelt
18:15 Lættur tónleikur
21:15 Orðið (e) Bíbliulestur v/ Anju Hansen
21:30 Beatin v/ Eyðfinn Drewsen Tónleikasending fyri ung
22:30 Náttartónleikur

**Lindin**

13.00 Byrjan – Dagsskrá verður lisin
13.15 Okkara dagliga breyð
13.30 "Lívgandi Orð" fyri hesa vikuna. v/ Tórður Petersen
14.00 Brot og bitar (e)
14.30 Ein forvitnislig ferð gjøgnum Bíbliuna. v/ Símun Absalonsen. gestur Jógvan Zachariassen.
15.30 Tónleikur
17.00 Bønartænastan byrjar. Tlf. 321377, tilber at senda fax nr. 321379 Vit spæla lovsong tann næsta tíman.
17.55 Dagsins orð eftir Svenning av Lofti
18.00 Bønartænastan. Biðji verður fyri bønarevnunum
20.00 Tónleikur fyri børn
20.30 Okkara dagliga breyð (e)
22.00 Dagsins orð eftir Svenning av Lofti
22.05 Horitzon Star v/ Stella Zachariassen (e)
23.05 Dagsskráin fyri leygardag verður lisin
23.10 Góður tónleikur fyri ung
04.00 Vit gevast